LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Norðlýsið
Att.: John William Joensen
jwj@nordlysid.fo

Tórshavn, tann 23. september 2016
J.Nr.: LUM-11- 16/00098-2
(at tilskila í svari)

**Viðvíkjandi klagu tíni viðv. Fiskimálaráðnum**

Tygum hava tann 22. september 2016 klagað til mín um avgerðina hjá Fiskimálaráðnum sama dag um at sýta innlit í alt samskiftið millum landsstýrismannin í fiskimálum og formannin í arbeiðsbólkinum viðvíkjandi nýskipan av fiskivinnuni um arbeiðssetningin hjá nevndini.

Saman við klaguni hava tygum sent mær avgerðina hjá Fiskimálaráðnum og skjølini, sum tygum hava fingið innlit í frá Fiskimálaráðnum. Fiskimálaráðið hevur ikki givið tygum fult innlit í málið við teirri grundgeving, at tað snýr seg um eitt lóggávumál, sum sambært § 2, stk. 2 er undantikið rættinum til innlit. Tað framgongur av skjølunum, at m.a. eitt reglubrot í einum teldubrævi frá landsstýrismanninum til formannin í arbeiðsbólkinum er strikað yvir.

Sambært § 6, stk. 4 í umboðsmanslógini (løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000) tekur umboðsmaðurin sjálvur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í einum máli, sum klagað verður um.

§ 2, stk. 2 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina) ásetir, at *lóggávumál* eru bert fevnd av lógini, tá lógaruppskotið er framlagt í Løgtinginum. Hetta merkir, at Fiskimálaráðið hevur ikki skyldu at lata innlit í mál um at fyrireika eitt lógaruppskot, fyrr enn uppskotið er lagt fram í Løgtinginum. At ítøkiliga málið, sum tygum hava biðið um innlit, er at meta sum eitt *lóggávumál,* meti eg ongan iva vera um, tí arbeiðsbólkurin hevur sambært arbeiðssetninginum sum uppgávu m.a. at gera "fullfíggjað uppskot til lóggávu". Reglurnar forða tó ikki Fiskimálaráðnum í at geva sokallað meirinnlit, og tað hevur Fiskimálaráðið eisini gjørt við at veita tygum partvís innlit í málið.

Vísandi til hetta havi eg onga viðmerking til avgerðina hjá Fiskimálaráðnum, dagfest 22. september 2016, og eg geri tískil ikki meira við klagu tygara.

Avrit av hesum skrivi er sent Fiskimálaráðnum til kunningar.

Vinaliga

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður